# Er samfelagið í kreppu?

EYÐUN MOHR VIDERØ



Okkara lítla samfelag hevur allar tíðir verðið roynt av niðurgongd. Aðrar tíðir hevur borið framá. Fólkið hevur viljan til at yvirliva, og tí hava kreppur í mestan mun hert vilja hjá fólkinum her at menna seg fram um kreppuna og livað víðari. Tað er jú her, vit hoyra til! Tað er her, okkara vøgga stóð og framvegis stendur hjá komandi ættarliðnum!

Vit liva í eini undarligari og onkisigandi tíð við núverandi niðursetandi og neiligu ávirkan frá okkara framsøgufólkum. Bæði á politiska økinum og fjølmiðlaøkinum!

Fyri stuttari tíð síðan vóru vit vitni til, hvussu fólkið í USA varð fóðrað við lyftum og ákærum frá politisku flokkunum í samband við val har.

Ráðandi flokkurin bað um góðkenning at varðveita galdandi politikk við ávísum ábótum, meðan mótparturin bað um stuðul til at fremja grundleggjandi broytingar.

Hóast ymiskar politiskar áskoðanir, so valdi meirilutin av fólkinum at stuðla til broytingar. Broytingin var stuðlað við einum jaligum vilja til ávísar ábøtur. Hvussu hetta annars fer at roynast, vita vit ikki.

Støðan her heima hjá okkum kann neyvan samanlíknast við støðuna í stóra USA, men kortini kunnu ákærur og lyfti hjá flokkum samanlíknast, og tó við heilt hvørt sínum endamáli!

Okkara politiska stríð snýr seg ikki um »ov nógvar óneyðugar útreiðslur í Afgahnistan« v. m. Ikki um teirra stríð fyri eini eftir okkara skipan hóskandi almannalóggávu.

Okkara politiska stríð snýr seg um at yvirliva við tí fólki og teimum virðum, ið hetta land ræður yvir!

Tí tykir mær so harmuligt, at okkara útbúnað fólk innan politikk og fjølmiðlar nýtir sína orku við sínum neiliga framferðarhátti at taka allan virkishug frá landsmonnum sínum!

Fíggjarorka landsins eru løgd í ávísa rammu til gagns fyri samfelagið. Við samtykki frá øllum innan politikk.

Fíggjarinntøkan er fallandi í hesum døgum, og nú verður leitað millum politikkarar, hvør hevur av teimum skyldina. Ja enntá verður kravd hægri løn í hesum niðurgongutíðum av fastløntum á landi. Minkandi inntøkan hjá vinnulívinum skal skapa størri inntøku til samfelagið!??

Mín sannføring er og hevur verið, at samfelagið fer at yvirliva, um sunt vinnulív sleppur at virka, og at vit politiskt við sjálvstýri ráða okkum sjálvum.

Her verður neyðugt at byrgja fyri ósunnum vinnuligum spekulantum, meðan føroyskt sjálvstýri verður sett á stovn!

Leiðin er helst long, men sjálv kreppan finnst millum politikarar og blaðfólk!!

# Tvey politimál

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Tvey mál, sum hava við løgregluna at gera, verða nógv umrødd í fjølmiðlunum í hesum døgum.

Annað málið er viðvíkjandi umskipanini av løgregluni og hitt er íkomið í sambandi við, at ein nýggjur politiinspektørur er settur í starv.

Viðvíkjandi málinum um umskipan av løgregluni, so eru atfinningarnar av tí vanliga slagnum, har sagt verður, at tað er einki galið við sjálvum málinum, men tað er mátin... Ella sum Annika Olsen segði í eini útvarpssamrøðu: "Tað er tað prinsippiella í tí..."

Trupulleikin sigst vera, at tingfólk vórðu ikki hoyrd í málinum, nei, tey vóru bara kunnað, og tað er ein ávísur munur á at verða kunnaður og at verða hoyrdur.

**Tingfólk vístu ongan áhuga**

Tað undrar meg, at so nógv verður gjørt burtur úr hesum málinum nú, tí tá ið kunningin fór fram, vístu tingfólk (millum annað tey, sum nú finnast at), sera lítlan – fyri ikki at siga ongan áhuga fyri málinum.

Fútin bjóðaði øllum 33 tinglimunum til kunnandi fund seinasta summar, har greiðast skuldi frá umskipanini av løgregluni, men bara tríggir tinglimir møttu. 30 tinglimir møttu ikki!

Nakrar dagar seinni fekk Lokalnevndin (har umboðum fyri løgtingið og løgregluna sita) somu kunning. Hóast eg eri limur í Lokalnevndini, hevði eg lítlan hug at luttaka á tí fundinum, tí eg hevði verið til tann fyrra fundin. Men tá eg sá, at eg var einasta løgtingsumboðið, sum var møtt, umframt Katrin Dahl Jacobsen, sum er forkvinna í nevndini, føldi eg meg, fyri skomm skyld, vera noyddan at verða sitandi.

So lítil var áhugin fyri hesum málinum, meðan tað enn var aktuelt. Men tá tað kemur til at grenja aftaná um manglandi kunning og ávirkan, tá er áhugin stórur.

**Politiinspektørurin**

Hvat hinum málinum viðvíkur, so eiga allar lógir sjálvsagt at verða fylgdar í sambandi við eina starvssetan. Men í aðrar mátar er talan um júst somu setanarviðurskifti, sum vóru galdandi, tá nýggjur landsantikvarur varð settur í starv fyri nøkrum árum síðani.

Tá, sum nú, stóð valið ímillum ein danskara og ein føroying. Føroyingurin hevði fyribils røkt starvið frammanundan (júst sum í hesum málinum), og hann hevði eisini allar neyðugar førleikar. Ein samd setanarnevn hevði ikki minni enn tvær ferðir mælt til at seta hann í starvið, men kortini valdi landsstýriskvinnan úr Tjóðveldisflokkinum, at seta danskaran, sum ikki hevði somu royndir og kunnleika til Fronminnissavnið, í starvið. – So hatta málið hava vit sæð fyrr.

# Hvar er málið?

ANDRASS SKAALUM
valevni til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna



Allir tryggingartakarar hjá Tryggingarfelag Føroyar hava rætt at stilla upp til og at velja fólk í umboðsráðið, men bert fá vita um henda rættin.

Umboðsráðið má taka stig til at broyta hesa støðu, skal vanligi tryggingartakarin ikki fá ta fatan, at limirnir í umboðsráðnum ynskja at hetta skal vera støðan.

Tað at fólk skula biðja um at fáa atkvøðuseðilin sendandi ger, at fleiri ikki fá tað gjørt og sostatt ikki luttaka í valinum, heilt nógv eru als ikki vitandi um, at valið fer fram.

Fyri tryggingartakaran hevði tað verið rímiligt, at atkvøðuseðilin kom sendandi, uttan fyrst at skula verða umbiðin. Tað hevði eisini verið rímiligt, at valevnini boðaðu frá síni visjón og endamáli við at stilla upp til umboðsráðsval, so veljarin fekk eina hóming av, hvat valið veruliga snúði seg um.

Verandi støða førir við sær eitt undarligt valstríð, har valevni mega órógva fólk við umbøn um at tey útvega sær atkvøðuseðil og um at atkvøða fyri sær til umboðsráðsvalið.

Persónliga fari eg at biðja fólk halda mær til góða, um eg havi órógvað tey við hesum.

Nú er bert eftir hjá teim, ið ikki enn hava sent atkvøðuseðilin inn, at fáa hetta gjørt áðrenn fríggjadagin.

»Sjáldan fast tað í lag, ið kemur í drag«, tí er umráðandi at fáa hetta avgreitt beinan vegin.

Les meir um málini her: http://www.bricksite.com/andrass

# Altjóða móðurmáladagur 21. februar

*O, móðurmál, hvussu livst?*

EYÐUN Á BORG



Tey »smáu« málini kring heimin hvørva sum døgg fyri sól. Tey verða køvd av teimum størru. Hjá føroyskum er støðan ikki so hættislig, men vit mugu kortini vera á varðhaldi.

Við tí málsliga hugburði, sum fleiri nú tykjast hava (ikki bara "Foreiningin"), har føroyskt og danskt næstan kann brúkast hvørt um annað, har føroyskir og útlendskir bókstavir kunnu vevjast í ein málsligan vavgreyt, ja, við slíkum hugburði kann vandi vera á ferð.

FOR EKSEMPUL: For exempil, forsempul!? Ja, hví ikki? spyr onkur. Er neyðugt at siga ella skriva »til dømis«?

Í seinastuni er málblandari komin á vøllin við rættiliga víðgongdum sjónarmiðum. Tað er sambært viðkomandi í lagi at blanda danskt upp í føroyskt, ikki bara munnliga, men eisini skrivliga! Sig so tað! Nýhugsan!?

TRAÐKA Í KARAKTER: Hugaligt var kortini í somu viku at síggja lesarabræv, har maður fanst at nýggjari føroyskari málisku: »at traðka í karakter«. Eg haldi, tað verður sagt í sambandi við ítrótt. Veit onkur, hvat tað man merkja?

ANGREB og FORSVAR: Hasi bæði orðini vórðu brúkt í eini útvarpsítróttarsending!? Ja, hví siga »álop og verja«, tá vit hava orðini »angreb og forsvar«?!

EITT MÁLTÍÐ: Soleiðis segði maður í útvarpinum sjálvan altjóða móðurmáladagin! Nei, eg nevni ikki navnið. Ein tíð er ikki hvørkikyn. En tid á donskum átti heldur ikki at verið hvørkikyn. Kortini siga danir »et måltid«!? Ein máltíð er tað rætta.

MUNTLIG LØGTINGSMÁL: Trífalt tvíve.løgting. fo . Har kallast okkurt »muntligir fyrispurningar«. Munnu tey ikki meina munnligir?

Vónandi fer løgtingið at taka undir við tí, sum Árni Dahl og hansara málnevnd hava lagt fram móðurmálinum at frama.

Vit mugu hava meira av føroyskum undirvísingartilfari og nógv meira av føroyskum teksti á sjónvarpsskíggjan!! Ansið nú eftir stavivillum, Dagur og vika!

E.S.: STAVINGIN: Í Føroyum stendur illa til við stavingini, heilt illa, sjálvt um føroyskt ikki er so torført at stava!? DØMI: Nøkur, ið vóru á seinasta skeiðið (huff, huff, eg sigi ikki meir).

E.E.S: Hví sleppur »Sprokstrikan« at skriva við dulnevni?

*Við móðurmálskvøðu*
*Á Borg á Argjum 1. várdag 2010*


